## HEILSANIR



**Góði Heini**
Omma og abbi ynskja tær tillukku við tínum fyrsta føðingardegi. Jesus pápi verið hjá tær. Vit elska teg.
**Ynskja Kirstin-omma og Hans-abbi**



**Góði Heini**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðinardegnum í dag. Jesus pápi signi teg.
**Ynskja mostir og gubbi**



**Góði Heini**
Lukku og gleði á tínum fyrsta føðingardegi. Jesus pápi signi framtíð tína, ynskja vit
**Hallur**

i
Sosialurin

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: .......................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

# Klaksvík fingið nýggjan vinarbý í Tanzania



*Væl av fólki leitaði sær innar í Gamalt/Nýtt, har alskyns lutir eru at fáa*

**Seinasta leygardag lat upp nýggj krambúð "Gamalt/Nýtt" í gomlu hølunum hjá Óla Gaard við gomlum vørum til endurnýtslu. Yvirskotið frá søluni fer til missiónsarbeiðið hjá donsku missiónsrørsluni Danmission**

STUÐULSBÚÐ
*Dávur Winther/Snorri Brend*

**Klaksvík:** Hevur tú hug at ogna tær eina brúka lampu, eina sofu ella ein tallerk, so kundi borið á, at tú fekk júst henda lutin í nýggja handlinum.

Nú hava klaksvíkingar so fingið henda møguleikan, sum higartil hevur verið nógv brúktur í øðrum londum: At keypa ein lut, samstundis sum ein er við til at stuðla einum góðum endamáli.

Danmissión hevur nú, saman við góðum fólki í Klaksvík, tikið stig til hesa stuðulsbúðina, sum leygardagin lat upp dyr sínar á fyrsta sinni fyri almenninginum.

Við til upplatingina vóru nógv fólk samankomin. Millum hesi taldist Hans J. Joensen bispur og borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, sum báðir bóru fram heilsanir á hátíðarligu løtuni.

Henda stuðulsbúðin er tann 76. í røðini hjá donsku missiónsrørsluni, og er somuleiðis fyrsti handilin av sínum slagi í Føroyum. Samstundis hevur Klaksvíkin tikið upp samband við Karagwe-stiftið í norðara parti av Tanzania.

### Stuðul til arbeiðið

Tá ið bispur Hans Jacob Joensen, bispur fyri fáum árum síðan var í Karagwe-bispadømi í samband við innsetan av biskopi har, kom upp á tal at gera eitt samstarv við Føroyar um hjálpararbeiði til Karagwe bispadømið gjøgnum Danmissión.

Og prátið hevur nú borið frukt! Við hjálp av nógvum góðum fólkum sæst úrslitið í hugnaligu hølunum á Klaksvíksvegi, har Malan á Mýri skal taka sær av tí dagliga arbeiðinum saman øðrum góðum fólki.

Talan er um eina kafékrambúð, har tú kanst seta teg niður, og eisini fáa eitt prát um, hvat Danmisión er, og fáa upplýsandi tíðarrit um felagsskapin. Hópin av áhugaverdum lutum, innbúgv, prýðislutir, kertuljós o.a.. fæst til keyps.

Í sambandi henda serliga dagin vóru fólk komin niðri frá við hópin av snotisligum innbúgvi frá harragørðum úr Danmark. Annars er ætlanin, at fólk úr Klaksvík og aðrastaðni skulu kunna lata lutir til sølu og endurnýtslu.

Krambúðirnar hava stóran týdning í hjálparabeiðinum. Tær standa fyri 1/3 av inntøkuni hjá felagsskapinum, sum hvørt er á 35 mill. Staturin játtar í ár 7,8 mill til Danmissión, sum eisini hevur samstarv við Danida.

Hølini vóru stúgvandi full av fólki, sum vóru komin saman at ynskja stigtakarunum tillukku við hátíðar løtuna, tá ið krambúðin lat upp:

Borgarstjórin Steinbjørn O. Jacobsen, Torben Holm, samskiftisskrivari; Hans Jacob Joensen biskopur og Sonja Klein prestur hildu røðu og fegnaðust um hetta góða og slóðandi tiltakið, sum stigtakanir fingu rós fyri.



*Borgarstjórin og sóknarpresturin vóru eisini samankomnir, tá nýggja stuðulsbúðin lat upp leygardagin*

**Danmission:**
Stovnað 1. januar 2000 og hevur sín uppruna í Det Danske Missionsselskab, sum varð stovnsett í 1821.
**Arbeiðir í 12 londum við:** Heilsu og umsorgan, kirkjustuðli, landbúnaðarráðgeving, tillagan av nýdønum, útbúgving av børnum og kvinnum, religiónsdialogi, stuðuls- og ættleiðingarskipanum fyri børn.
O.u. 2000 sjálvbodnir hjálparar, 30 trúðboðarar, 22 starvsfólk - o.u. 4000 børn verða stuðlað gjøgnum skipanina. Umframt túsundtals menniskju, sum verða hjálpt á annan hátt gjøgnum ymiskar verkætlanir.

**Teldupostur:**
danmission@danmission.dk
**Heimasíða:**
www.danmission.dk